## 17.000 børn doyggja í hungri

Tað var ikki serliga hugaligur lesnaður, sum ST-aðalskrivarin, Ban Ki-moon, segði fram á einari matvøruráðstevnu, sum heimsfelagsskapurin heldur í Rom í hesum døgum. Í einari drúgvari frágreiðing vísti aðalskrivarin á, at meiri enn ein milliard fólk í heiminum svølta, og at á hvørjum ári doyggja seks milliónir børn í hungri. Tað merkir, at 17.000 børn doyggja í hungri um dagin. Teir umleið 60 ríkis- og stjórnarleiðararnir á ráðstevnuni vóru á einum máli um, at tað er neyðugt við skjótum tiltøkum, sum skulu útvega fólki mat í munnin.



## Svangir amerikanarar

Hóast tað almenna í USA hevur sett framt fleiri átøk, sum skulu hjálpa teimum ringast støddu í samfelagnum, vóru tað framvegis umleið 50 milliónir amerikanarar, sum høvdu ov lítið til matna í fjør. Tað var mundandi fleiri enn í 2007, tá talið var 36 milliónir. Tølini eru úr einari nýggjari frágreiðing. Hon vísir millum annað, at meiri enn 14 milliónir húski í USA høvdu ilt við at fáa nóg mikið til matna í fjør, tí tey høvdu ikki pengar at keypa mat fyri. Barack Obama, forseti, sigur, at tann nýggja frágreiðingin er hugvekjandi, og hann lovar at fara í hernað ímóti fátækradøminum.



*Hóast Jenis av Rana nýtir bæði bíbliu og stetoskop í sínum yrki, so dámar honum ikki reiðiliga at kanna, hvussu hann heldur, at Gud hevur hjálpt ávísum sjúklingum. Hann er meira við í kristnum læknafelagi fyri at stuðla øðrum læknum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Jenis av Rana:

# Prógvar Gud við sjúkum

**Jenis av Rana og 400 aðrir læknar vóru fyri kortum á kristnari læknaráðstevnu. – Endamálið við ráðstevnuni er at dokumentera, at tað læknaliga loysir seg at biðja fyri fólki, sigur hann**

LÆKNARÁÐSTEVNA
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Ein ukrainskur lækni helt uppá, at ein sjúklingur var grøddur fyri hepatitis c, og sjúklingurin var sjálvur og vitnaði um tilburðin.

Hetta er bara eitt av dømunum av tí, sum gekk fyri seg á læknaráðstevnu í Kiev í Ukraina fyri stuttari tíð síðan.

Millum teir 400 læknarnar á ráðstevnuni var eisini Jenis av Rana, og hann er sannførdur um, at tað besta hevði verið, um vit púra sluppu undan at brúka medisin og bara nýttu bønir at verða grødd við, men hann er eisini sannførdur um, at heilivágurin hjálpir væl til.

– Tað besta hevði verið, um vit fyrst bóðu, áðrenn vit fóru til læknan. Og um tað so ikki riggaði, so kundu vit farið til læknan, sigur Jenis av Rana, sum altíð nýtir bønir í sínum arbeiði.

– Tað er ikki soleiðis, at eg biði fyri hvørjum einstakum sjúklingi, men eg biði fyri teimum, sum ynskja, at eg biði fyri teimum, og onkuntíð spyrji eg sjúklingin, um eg kann sleppa at biðja fyri honum. Hetta er ongantíð illa móttikið, og ongin av teimum, sum ganga til lækna hjá mær hava nakrantíð sagt nakað negativt um tað andaliga, greiðir læknin frá.

Hann leggur tó afturat, at tað ofta er ilt at siga, hvussu nógv gud hevur gjørt, men hetta skal spurnartekin ikki setast við, tí Gud er ikki til at skilja.

– Tá fólk vita av, at tú biður fyri teimum, meðan tú samstundis gevur teimum heilivág, so er ilt at siga, hvat spælir mest inn. Tað hevur sjálvandi eisini nakað at siga, at fólk vita av, at mann hugsar um tey, tí umsorgan hevur so nógv at siga.

### Hjálpir útlendingum

Somuleiðis fortelur Jenis av Rana, at orsøkin til, at hann er við í felagsskapinum ikki fyrst og fremst er, at kanna arbeiðið hjá Gudi, men at hann meira er við fyri at stuðla útlendskum læknum, sum ivast um teir skulu tora at brúka bønir í sínum læknaligu størvum.

– Her er samfelagið í Føroyum so mikið lítið, at øll vita, hvat eg standi fyri og so framvegis, men aðrastaðni kunnu læknar fáa trupulleikar at nýta bønir, sigur Jenis av Rana.

Í Føroyum eru eisini aðrir læknar, sum nýta bønir í síni viðgerð, men tað er ikki nakað læknarnir tosa um sínámillum.

– Tíverri. Tað er ikki nakað vit vanliga tosa um. Vit hava ongan felagsskap fyri kristnar læknar í Føroyum.

### Kundi spart á fíggjarlógini

Jenis av Rana hugsar somuleiðis ofta um, hvussu gott tað hevði verið, um mann kundi brúkt bønir í heilsuverkinum sum heild.

– Eg hugsi ofta um, hvussu nógv tað kundi spart samfelagnum, um vit púra sluppu undan heilivági. Hugsa tær, hvussu nógv vit kundu spart á fíggjarlógini, heldur Jenis av Rana.

Men hann er sannførdur um, at heilivágurin eisini hjálpir heilt nógv, og at bønirnar og heilivágurin stuðla hvørjum øðrum væl.

### Hokus pokus

Hóast Jenis av Rana er sannførdur um, at bønir veruliga hjálpa, og hevur dømir um, at fólk er blivin frísk, tá biðið hevur verið fyri teimum, eftir at vanliga læknavísindin ikki kláraði meira, so sigur hann seg eisini vita, at nógv ikki er verk Guds.

– Tað er nógv hokus pokus nógva staðni, og vit mugu minnast til, at tað eru tveir andaheimir. Tann góði og tann óndi. Í gamla testamenti síggja vit eisini, at menninir hjá Farao eisini megna at gera nakrar av plágunum. So báðir heimarnir megna at gera undur. Men tað er øgiliga týdningarmikið, at mann brúkar tann góða gudin, tí tað ónda kann rigga, men tað vil ikki nakað gott, heldur Jenis av Rana uppá.